## Minni av stórhvali

Tøl, sum vísindanevndin hjá altjóða hvalaveiðinevndini IWC hevur lagt fram, vísa, at sildrekastovnurin á íslendska landgrunninum er minkaður nógv tey seinastu árini. Í fjør vísti ein teljing, at umleið 10.600 sildrekar vóru á landgrunninum, og tað var munandi minni enn í teljingini í 2001. Felags føroyska-íslendska hvalateljingin í fjør vísti eisini, at talið á langer minkað nakað samanborið við teljingina fyri sjey árum síðani, skrivar Vísir.



## Leitaðu eftir ísbjørn

Tilburðirnir í seinastuni við tveimum grønlendskum ísbjarnum í Íslandi hava sum vera man fingið fólk á Norðurlandinum at halda eitt vakið eyga við náttúruni og stundum eitt ov vakið eyga. Í gjár fingu myndugleikarnir boð um, at fólk høvdu sæð ei na ísbjørn á Skaga á Norðurlandinum, og sjóverjan sendi alt fyri eitt eina tyrlu úr Reykjavík at leita. Men tyrlan fann einki, og ein onnur tyrla, sum leitaði seinni, fann heldur onga bjørn, skriva bløðini.

# Postverkið skal trimmast

**Eini sjeyti størv skulu niðurleggjast í Postverkinum komandi árini, harav tað mesta er natúrlig frágongd. Harumframt skulu lønarútreiðslurnar minka við eini 25 milliónum krónum**

POSTVERK FØROYA

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*




*Sofus Clementsen, stjóri í Postverkinum, og Ben Arabo, nevndarformaður, greiða frá nýggju ætlanunum hjá Postverki Føroya. Í framtíðini skal Føroya fólk venja seg við at avgreiða síni postin í einari automatiskari posttøku, sum sæst á myndini. Tær fara at standa á Shellstøðum kring landið*

Postverk Føroya hevur tvey tey seinastu árini havt hall á rakstrinum, og heldur verandi gongd fram er eginpeningurin burtur um trý ár. Hallið í fjør var á leið 2,2 milliónir krónur, og árið fyri var eisini undirskot á botnlinjuni. Leiðslan í Postverkinum hevur tí gjørt eina trý ára ætlan, sum skal bjarga felagnum.

Ben Arabo, nevndarformaður, greiddi á tíðindafundi mánadagin frá støðuni og framtíðarútlitunum hjá Postverkinum. Høvuðstrupulleikin er, at postmarknaðurin minkar skjótt, og at marknaðartillagingin av Postverkinum gongur ov seint. Síðan Postverkið bleiv umskipað til partafelag kann felagið sjálvandi ikki liva við einum stórum undirskoti á hvørjum ári.

Og tað standa stórar broytingar fyri framman í Postverkinum. Ikki færri enn sjeyti størv verða niðurløgd komandi árini. Tað mesta av hesum stendst av natúrligari frágongd, av tí at miðalaldurin í Postverkinum er høgur, og fleiri fara frá fyri aldur í hesum tíðarskeiðnum.

### Stór minking í brævaflutningi

Leiðslan í P/F Postverk Føroya legði mánadagin sínar broytingarætlaninar fram. Málið hjá leiðsluni er, at raksturin skal geva yvirskot innanfyri trý ár, og ein av hættunum at røkka hesum máli er, at fleksibiliteturin skal økjast, soleiðis at starvsfólk røkja meira enn eina uppgávu í fyritøkuni. Umskipanin av postútberingini, sum bar í sær, at posturin verður borin út seinnapartar av fólki í parttíðarstarvi, var fyrsti liður í hesi ætlan.

Brævaflutningurin hevur verið í stórari minking seinastu árini, og av tí at hetta hevur verið berandi virksemið í Postverki Føroya, er neyðugt við tillagingum. Ben Arabo greiddi frá, at brævaflutningurin er minkaður við átta prosentum seinasta árið, og hetta hevur havt avleiðingar fyri Postverkið, sum má tillaga virksemið til nýggja veruleikan. Brævaflutningurin, sum hevur verið tann mest týðandi parturin av virkseminum hjá Postverkinum, fer væntandi at lækka enn meira.

Í fleiri øðrum londum hava postverkini havt eina stóra øking í pakkaflutningi orsakað av størri nethandli, men í Føroyum hevur nethandilin ikki veruliga tikið dik á seg enn, og tí hevur Postverkið ikki fingið nakað virksemi ístaðinfyri tann minkandi brævaflutningin.

### Postavgreiðsla á Shell

- Leiðslan metir, at tað er neyðugt at ganga nýggjar leiðir fyri at røkka teimum málum, hon hevur sett sær, og fyrsta stigið er at umskipa postflutningin, soleiðis at privatu kundarnir fáa postin aftaná arbeiðstíð, meðan vinnukundarnir verða røktir í arbeiðstíð, segði Sofus Clementsen, stjóri.

Hendan effektivisering fer at merkja ein betraðan rakstur uppá 8 milliónir krónur eftir trý ár sambært útrokningum hjá leiðsluni.

Harumframt er ein samstarvsavtala gjørd við Føroya Shell um at seta posttøkur upp á bensinstøðum kring landið. Posttøkur eru diskar, har tað er møguligt at avgreiða øll tey vanligastu ørindini á posthúsinum frá klokkan sjey á morgni til klokkan ellivu á kvøldi. Tann fyrsta posttøkan verður sett upp á Shellstøðini í Gøtudali í oktober. Síðani verða fleiri posttøkur setta upp í 2009.

Í samband við tey smáu posthúsini kring landið greiddi Sofus Clementsen frá, at Postverkið er bundið til at hava 21 posthús opin inntil 2010, men eftir tað vera eftir ætlan sjey posthús í Føroyum.